# Bodil Ejdesgaard í Oyndarfirði fyllir 70 ár

At sita og skriva eina føðingardagsheilsu til mammu sína, er ein torfør uppgáva, sjálvt fyri ein mann, sum onki annað heldur seg til, enn júst at skriva. Tað kennist, sum høvuðpersónurin stendur einum alt ov nær til at frælsi og rúmd gerst í skrivingini og allíkavæl, so kann eg ikki heilt lata vera. Haldið mær til góðar.

Mamma fyllir 70, og tað er ein ung mamma vit eiga sætt í mun til hennara børn.

Tað eru bara 19 ár millum meg og mammu og tað eru bara 17 ár millum mammu og elstu systir mína Sólgerð. Millum yngra beiggja mín í eldra systkinnaflokkinum Jón Inga og mammu eru 21 ár og millum yngstu systrina Lív og mammu eru 23 ár. Tann eldri systkinnaflokkurin í okkara heimi er longu nú ein gránaður flokkur, um hárið ikki er litað og enn er mamma sum ein brúður, full av virkisfýsni og slett ikki mett av døgum.

Vit vóru sjey systkin og nú eru vit seks. Vit komu í tveimum tíðarskeiðum. Vit eldru seinast í fimtiárunum og inn um gáttina av sekstiárunum. Tey yngru seinast í sekstiárinum og inn í gongina í sjeytiárunum.

Vit eru fýra eldri systkin og so komu tríggir beiggjar aftur at. Tann fyrsti varð doyptur Sjúrður. Hann gjørdist ongantíð meira enn fimm ár. Ein ógvuliga fittur smádrongur, sum smádrongir eru, og sum var so óheppin ein dag um hesa tíðina í september 1974, at detta á sjógv norður á keiini í Oyndarfirði og hann druknaði. Vit eiga hann í minninum frá tí hann brádliga kom til verðina sum skyggjandi sólstrála í 1969, og til hann eins brádliga sløknaði fimm ár seinni. Hann hevði verið 39 ár nú. Hvussu hevði hann sæð út í dag og hvat hevði hann tykist við?. Nei, hetta eru bara tankar, hann gjørdist ongantíð meira enn fimm og tað ber mær slett ikki til at ímynda mær hann sum vaksnan. Hann er og verður lítli smádrongurin í mínum minni, hvørs flógva reyðgula lívsglæma sløknaði alt og skjótt. Og sambært míni trúgv, sum er full vissa um tað sum ikki sæst, so livir hann í besta velgående og er allarheslt tilvitaður um, at eg siti og skrivi um hann nú, og hann undrast heilt víst á, at mannabørn eru so óvitandi, tí skilnað-urin, sætt í mun til ævinleikan, kann ongantíð gerast annað enn eitt splitsekund um sekund í heilatikið eru galdandi í ævinleikanum fyri handan. Er tað ikki vit mannabørn, sum hava uppfunnið tíðina?

Tey seinnu trý systkinni komu eins tøtt og vit. Sjúrður í 1969, Fróði í 1971 og lítlibeiggin Sjúrður í 1973. Og øll hesi børn hevur mamma borið og verið um og havt ilt við at sleppa, tá íð tey eru vorðin vaksin.

At fylla sjeyti er ein gleðishending. Tað merkir, at 70 ár eru komin til mammu og ikki at 70 ár eru liðin. Kroppurin er slitin, tí mamma er ein av teimum, sum var fødd við einum ógvuliga stórum motori og hon hevur verið arbeiðssom sum fáar.Viðhvørt havi eg hildið, at hon hevur havt ovnógva arbeiðsgleði, og ov stutta tíð at njóta lívið, sum er komið til hennara. Hesa áskoðan havi eg broytt við árunum, tí lívið hevur lært meg, at himmiríkið er eisini á jørð og har er tað onga aðra staðni enn inni í okkum sjálvum, har tað síðani sprettir út til okkara med-



menniskju Tað nærmasta tú kemur hesum, er at vera uppslúktur í tí tú hevur hug til, tá er ikki pláss fyri lemjandi fortíð, ei heldur fyri drepandi óvissu frammi í tíðini, tá er bara pláss fyri løtuni her og nú og í henni eru tilstandirnir paradisiskir, hvørki meira ella minni. Soleiðis hevur mamma havt tað. Og soleiðis fortaldi meistarin okkum um paradísið inni í okkum sjálvum fyri skjótt 2000 árum síðani. Tað var sætt tá og tað er líka sætt enn.

Eg hyggi mær, meðan eg siti og skrivi nú úti á Hellunum og mamma fýkur aftur og fram heimi í Oyndarfirði og riggar til føðingardagin til. Hon er pásettilig sum fá og onkra løtu er hon í øðini, tí Gekkurin hevur loypt ólag á føðingardagin. Hon fyllir fríggjadagin, men hon verður noydd at boyggja seg fyri gramleika mannabarna og millióníni sum helst ongin vinnir. Og skuldi onkur vunnið hana, so er hann ikki ríkur, um hann ikki er vísur í at hann hevur nokk. Heldur hon føðingardagin fríggjadagin, so verður hon einsamøll í skúlanum, har ballið skal verða. Og tað vil hon ikki. Føðingardagurin verður hildin leygarkvøldið og klokkan seks vónar hon at gestirnir koma.

Okkara familja er onki ørvísi enn aðrar familjur og familjumynstrini trívast í besta velgaaende. Mamma er fyri nýggjum, og so er hon eisini stokk konservativ. Hon hevur sett upp á, at hon vil hava fekst sum viðskera til násturan leygardagin. Ikki fekst úr frystiboks, men eitt lamb sum skuldi flettast til endamálið. Teir elstu synirnir fingu uppgávuna. Mánakvøldið var deadline ella evsta mark, skuldi lambið náa at verða kókað og skinsað til komandi leygarkvøld. Klokkan gjørdist hálvgum tíggju á kvøldi og hon hevði onki sæð til teir elstu synirnar og hon tørnaði inn og sløkti hvørt ljós í okkara barnaheimið. Eg haldi at ringa lag var á henni. Her hevur hon gingið og stríðst alt lívið, og hvat er so tøkkin? Ikki eitt lamb vilja teir fletta. Tit kenna foreldur. Morgunin eftir hevði hon ikki mist vónina allíkavæl um slaktið og hugdi varisliga út í hjall. Har lá krovið av einum góðum gimburlambi, kjøtríkt og við reyðum síðum, ættað úr Giljagonguni frammi á Heltn sum er eitt hitt besta smørholið í landinum og tit kunnu ætlað at lagið var gott, tá íð vit tosaðu saman týsmorgunin. Meðan hesar reglur verða skrivaðar, taka skinsasíðurnar við salti.

Mamma hevur verið einkja seinastu átta árini, síðan pápi, Leivur Eidesgaard, sløkti sína seinastu sigarett ella ball tann 19. februar 2000. Og hon man verða ein tann virknasta einkjan føroyingar nakrartíð hava átt. Hon hevur snøgt sagt ikki verið undir taki síðani. Virkin í føroyskum heimavirki, handilskvinna innan heimavirki, oddafiskur innan pensionistafelagsskap og framvegis mamma og omma. Virkin urtagarðskvinna og skapandi allastaðni har hon er. Eg eri fegin um at eiga eina mammu, sum ikki bara situr heima og grenjar um egna vanlagnu, men at hennara innari motorur enn førir hana víða um. Tað er stuttligari at eiga eina mammu, sum er móð av egnum virksemi, enn møðd av at ganga upp í meg og hvat geri og serliga hvat eg ikki geri.

Akkurát nú rindar hon møðina eftir eitt risastórt listaverk, sum hon hevur lagt úr hondum og sum liggur á gólvinum í kirkjuni í Oyndarfirði av forkirkjugáttini og inn í kór. Tað er eitt vovið teppið og peningurin til hetta teppið kemur frá tí seinasta hálva gyllininum, sum enn var í okkara familju úr Tarti í Oyndarfirði. Í Tarti er aðalurin í Oyndarfirði og blóðið er blátt í okkara æðrum. Ein oyndfirðingur, sum ikki kann rokna sína slekt í Tart, verður ikki rættuliga taldur við. Eg havi tvær greinar sum ganga beinleiðis í Tart, mamma eigur bara eina og tað eru tey í okkara bygd, sum við øvund hyggja tráandi eftir so fínum ættrótum. Tá ein eigur ein oldurabba og eina oldurommu úr Tarti, tá kann mann ikki klaga. Og tað stuttligasta við hesum megnar ognarhúsið frá 19 øld er, at ongin ungur ánar nakað um tað. Slottið í Tartabønum varð niðurtikið fyri mína tíð og eftirkomararnir eru meginparturin av núlivandi oyndfirðingunum O)))

Eg eigi eina krútsterka mammu og eg eri stoltur av henni og góður við hana. Eg hevði eisini elska hana eins nógv um hon var veik , um hon ikki megnaði so nógv og eisini um hon var minni sjónlig. Eitt tað týdningarmesta í lívinum hjá øllum mannabørnum er at ríva seg leysan av foreldrunum og møta teimum aftur sum vaksin á jøvnum føti.

Faðirin at gestaltterapiini, berlinarin og sálarfrøðingurin Frits S Perls 1893-1970 hevur skrivað hesi vøkru orð um sambandið við foreldrini:

*Eg geri tað eg vil, og tú ger tað tú vil*
*eg eri ikki settur í heimin*
*fyri at liva upp til tínar vónir*
*og tú er ikki sett í heimin*
*fyri at liva upp til mínar.*
*Tú er tú og eg eri eg,*
*skuldi tað hent, at vit finna hvønn*
*annan*
*er tað vakurt*
*um ikki, tá er einki at gera við tað*

**Heilsan Jústinus**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá elskaða mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Elsa Midjord**
av Økrum

andaðist og varð borin til hvíldar.
Takk til starvsfólkið á B7, sum tóku sær so
væl av henni.
Takk til prestarnar fyri góð og troystarrík orð í
kapellinum og í kirkjuni.
Takk til sangarar, berarar, kirkjutænarar, sangkórið í
Sumba og til tykkum øll, sum á ymiskan hátt
hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna.
Hjartans tøkk til tykkum øll sum fylgdu henni til
hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jákup, Jan, Finnbogi, Hildibjørg og Peturbjørg**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum teimum,
sum gleddu meg á 70 ára degnum.
Takk fyri blómur, vitjan, fjarrit,
telefonuppringingar frá nær og fjar, og øll
tit, sum vundu Merkið á stong,
takk øll somul.
Serstøk tøkk til kokkarnar, sum gjørdu
mær dagin ógloymandi.

Harrin signi tykkum øll.

**Heilsan**
**Paula Strøm**

## Tøkk

Øllum teimum mongu, sum við blómum
og gávum mintust meg, nú eg fylti
níti fimm, takki eg hjartaliga.

**Janus Kamban**

**Dagurin**
**20. september. Tobias**. Til minnis um tann Tobias, sum apokrýfiska bókin Tobits bók veit at siga frá. Navnið er hebráiskt og merkir Guð er góður.

**21. september. Matteus**. Ápostulin og evangelisturin Matteus. Halgisøgan veit at siga, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór Matteus til Etiopiu og boðaði evangeliið har. Er helst ein av teimum, sum á kirkjubøstólunum er avmyndaður við bók í hendi. Kongurin í Etiopiu læt hann taka av døgum. Bíbilska navnið merkir Guðs gáva.

**22. september. Mauritius**, deyður umleið ár 300. Rómverskur herhøvdingi, sum saman við 6666 hermonnum í liði sínum (tebansku legiónini), ið allir vóru kristnir, varð tikin av døgum. Navnið merkir blámaður.